# Alivinnan

## Tilmæli til karmar

## 2003

**Føroya Havbúnaðarfelag**

**Arbeiðsbólkur 2003**

**R.C. Effersøesgøta 30,**

**Fo-100 Tórshavn**

## Niðurstøða

Alivinnan er í sera stórum trupulleikum. Lágir marknaðarprísir yvir eitt longri tíðarskeið og ILA-sjúkan hava havt við sær, at alivinnan hevur havt stórt hall tey seinastu tvey árini. Um hendan støðan heldur sær árið út, verður eingin eginpeningur eftir í vinnuni til at føra alivinnuna víðari, og tí kann staðfestast, at alivinnan er í svárari kreppu, og loysnir skulu á borðið í bræði, um ikki alivinnan heilt skal steðga upp.

Í hesum sambandi hevur nevndin í Føroya Havbúnaðarfelag sett ein arbeiðisbólk at lýsa karmarnar, sum alivinnan arbeiðir innanfyri og koma við tilmælum at betra karmarnar.

Við ársenda 2000 hevði alivinnan 500 milliónir krónur í eginogn. 1. juli 2003 var tann bókaða eginognin svunnin til 227 milliónir krónur. Við ársenda er vandi fyri, at lítil ella ongin eginogn er eftir við verandi lágu laksaprísunum og sjúkutrupulleikunum. Harafturat hevur alivinnan medio 2003 eitt gjaldførishall á 245 milliónir krónur, sum antin skal gjaldast ella sanerast. Nú alivinnan hevur stóran tørv á eginpeningi kann staðfestast, at verandi eigarar ikki sjálvir megna at seta nøktandi pening í. Trupult er eisini at fáa nýggjan eginpening frá øðrum føroyskum íleggjarum og verandi lóggávu er ein forðing fyri útlendskum íleggjarum.

Føroyska alivinnan er í størri kreppu enn alivinnan í grannalondunum, og orsøkirnar eru fleiri, m.a. ILA-sjúkan. Eisini skattareglurnar hava gjørt kreppuna størri. ILA-sjúkan hevur kostað alivinnuni umleið 250 milliónir krónur. Alivinnan hevur goldið umleið 100 milliónir krónur í skatti, sum ikki høvdu verið goldnar, um alivinnan hevði somu skattaviðurskiftir sum alivinnan í Norra.

Sum avleiðing av fíggjarligu trongstøðuni er smoltútsetingin minkað niður í ein triðing. Um nýggjur eginpeningur ikki kemur í vinnuna, so verða væntandi bert 1 til 3 milliónir smolt sett á sjógv næsta ár. Hetta merkir, at útflutningurin í 2005 verður umleið 20.000 tons og í 2006 6.000 tons. Í dag er útflutningurin umleið 47.000 tons í kruvdari vekt.

Um alivinnan skal menna seg aftur, er neyðugt, at karmarnir verða lagaðir soleiðis, at vinnan aftur verður lokkandi og atkomilig fyri íleggjarar og fíggjarar.

## Tilmæli

Sjálvt um alivinnan í løtuni er í svárari kreppu, ynskir Føroya Havbúnaðarfelag ikki, at tað almenna kemur inn við studningi til vinnuna. Hinvegin ynskir felagið, at tað almenna broytir lógarkarmarnar, sum ávirka alivinnuna, so henda vinnugrein í framtíðini fær karmar á kappingarførum støði við grannalondini.

Karmarnir, har tilmælt verður at gera broytingar, eru:

- niðurberjing av ILA
- kappingarføra atgongd til íleggjarar
- møguleika fyri veðseting av aliloyvum
- lagaligari skattaviðurskifti
- tryggari og betri marknaðaratgongd

**Niðurberjing av ILA**

Til tess at basa ILA sjúkuni hevur landsdjóralæknin í tøttum samstarvi við Føroya Havbúnaðarfelag gjørt eitt umfatandi og neyðugt arbeiði. Tvær nýggjar kunngerðir verða lýstar í næstum. Onnur er ein nýggj ILA kunngerð, har m.a. krøv eru um at leita eftir ILA. Har er eisini reglur um, at í ringum, har ILA sjúkan er útbrotin, skal fiskurin takast innan 14 dagar.

Hin kunngerðin er um rakstur. Hon ásetir reglur m.a. um árgangsskiljing og økishvíld. Har eru eisini reglur um, at allar alistøðir skulu hava eina tilbúgvingar-ætlan, sum prógvar, at alistøðin er før fyri at taka nógvan sjúkan fisk sera skjótt.

Hesar kunngerðir saman við undanfarnu kunngerðum vilja leggja góðar karmar fyri niðurberjing av ILA sjúkuni. Tó koma tiltøkini at hava stórar fíggjarligar avleiðingar í eitt tíðarskeið, hóast fíggjarlig atlit eisini eru tikin í kunngerðunum.

Mælt verður til, at almenni myndugleikin setir meira orku av til sjúkuniðurberjing, og at gjøld fyri kanningar og sýnir álagdar í kunngerðum eru ókeypis fyri vinnuna, umframt at hugt verður eftir, um uppgávurnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eiga at raðfestast øðrvísi.

Mælt verður staðiliga til, at Vinnumálaráðið ger alt sum er neyðugt fyri, at ES gevur Føroyum loyvi at koppseta ímóti ILA.

Somuleiðis verður mælt til, at myndugleikin tryggjar, at aliøkir, sum eru rakt av sjúku, ótarnað kunnu virka í einari verkfallsstøðu.

**Kappingarføra atgongd til íleggjarar**

Lóggávan ásetir, at útlendingar ikki kunnu eiga meira enn ein triðing av partabrøvunum í einum sjógvalara. Føroyska alivinnan hevur tí avmarkaða atgongd til kapital. Vinnan má í stóran mun byggja sítt virksemi á føroyskar íleggjarar.

Í grannalondunum kann nýggjur eginpeningur fáast til vega við, at fyritøkan fer á partabrævamarknaðin ella við, at onnur feløg seta partapening í; tað verði seg lokal ella útlendsk feløg. Stór altjóða alifeløg framleiða í grannalondunum, og tey hava fíggjarliga styrki til at hava eina støðuga framleiðslu.

Teir føroysku alararnir eru lutfalsliga lítlir framleiðarar og eru tí sárbarir fyri teimum stóru sveiggjunum í marknaðarprísinum. Virksemið í tí føroysku alivinnuni má fylgja tí fíggjarligu styrki, sum alarar hava. Lítil og eingin eginpeningur er eftir, og framleiðslan minkar tí við ferð.

Við verandi lóggávu hevur alivinnan rættiliga avmarkaðar møguleikar til nýggj innskot av eginpeningi, og hesar avmarkningar hava avleiðingar, tí kapitaltørvurin hjá alivinnuni er sera stórur í mun til tøka kapitalin í Føroyum.

Møguleikarnir fyri at fáa eginpening í alivinnuna við verandi lóggávu í Føroyum eru, at (i) verandi eigarar av alibrúkum seta meira pening í; (ii) lokala intiativið tekur eitt tak fyri at seta pening í; (iii) onnur privat feløg og almennir grunnar seta pening í.

Verandi eigarar hava sera avmarkaðar møguleikar og kunnu tí ikki koma við stórvegis nýggjum eginpeningi. Siðvenja hevur verið, at ein bygd ella býur ella oyggj hevur savnað pening saman til dømis til at keypa skip ella opna fiskavirki. Tað lokala intiativið er ikki loysnin í alivinnuni, tí bæði vágin og tørvurin er ov stórur. Staðfestast kann, at føroyskar fyritøkur ella almennir grunnar hava í lítlan mun sett eginpening í alivinnuna. Orsøkin kann vera, at eingin siðvenja er fyri at seta pening í eina vinnugrein, sum alivinnuna, har rættiliga fá hava innlit.

Um alivinnan skal endurreisa seg, er neyðugt, at útlendskir íleggjarar hava møguleika at luttaka í størri mun, enn lógin gevur loyvi til, herí at eiga meirilutan í einari alifyritøku. Við útlendskari fígging høvdu fíggjarmøguleikarnir verið munandi

betri. Hetta vildi viðført, at niðurgongdin ikki hevði verið so stór, sum í dag kann staðfestast, og um útlendsk fígging fær atgongd til føroyska alivinnu, vil hon reisa seg skjótari aftur, enn hon fer at gera bert við føroyskum íleggjarum.
Alivinnan mælir tí til, at útlendskir íleggjarar skulu hava fría atgongd til ta føroysku alivinnuna uttan lógarsettar forðingar.[1]

**Veðseting av aliloyvum**

Vinnan mælir til, at møguligt verður at veðseta aliloyvi, og at loyvið ikki verður inndrigið í einari konkursstøðu. Hetta fyri at verja virðini hjá teimum, sum hava fíggjað. Frá føroyskum peningastovnum verður upplýst, at um veðseting ikki verður loyvd, verður sera trupult at fáa fígging í framtíðini. Tað er tí ein avgerðandi fyritreyt, at tann almenni myndugleikin loyvir veðseting av aliloyvum í framtíðini.
Royndir vísa, at tann bíligasta loysnin fyri allar kreditorar er, at umstruktureringin av felagnum verður gjørd, áðrenn komið verður til ein gjaldsteðg ella eina konkursstøðu. Tí er tað eisini umráðandi, at aliloyvið kann flytast ímillum eina búskaparliga umstrukturering, áðrenn felagið kemur í eina konkursstøðu, sum altíð er sera kostnaðarmikil fyri allar kreditorar. Um aliloyvi kann veðsetast, so viðførir tað, at veðhavarin kann selja fiskin og veðsettu støðisfæini við loyvinum til triðja mann.
Ein veðseting viðførir sostatt, at peningastovnarnir og kreditorar aftur fáa møguleikan til at veita nøktandi fígging til alivinnuna.

**Skattaviðurskiftir**

Skattaviðurskiftini í alivinnuni í grannalondunum eru munandi betri enn í Føroyum. Munurin er í goymsluáseting, viðvíkjandi skattaafturbering og framflyting av skatt-ligum halli.
Í Norra er skipanin soleiðis í skattaroknskapinum, at skattur verður ikki goldin, fyrr enn tað akkumuleraða yvirskotið er størri enn virðið av fiskinum, sum svimur í ringunum. Skattur goldin eitt ár kann verða endurgoldin felagnum innan tvey ár, um tað vísir seg, at felagið fær undirskot innanfyri hetta tíðarbilið. Hall kann førast fram

[1] Havsbrún p/f mælir til, at markið fyri útlendskum íleggjarum verður hækkað, men at útlendskir íleggjarar ikki kunnu eiga meirilutan

í 10 ár og trekkjast av skattliga úrslitinum. Í Írlandi og Hetlandi er einki mark fyri møguleikanum at framføra hall.

Sum omanfyri nevnt eru skattareglurnar í Norra munandi lagaligari enn tær føroysku. Úrslitið vísir seg at vera sera kappingaravlagandi. Umframt at gjalda minni skatt og harvið fáa eitt munandi betri gjaldføri, gevur hetta eisini eina stóra rentusparing hjá norskum feløgum og harvið ein hægri eginpening. Føroyska alivinnan hevur síðani 1993 goldið 100 milliónir krónur í skatti. Í 2002 vísa allir roknskapir hall. Sama støðan ger seg galdandi í Norra, men har goldu feløgini lítlan ella ongan skatt, og tey sum goldu skatt fáa hann nú endurgoldnan. Um norsk skattaviðurskiftir vóru galdandi í Føroyum hevði stórur partur av hesum skatti ikki verið goldin. Hesin skattur hevði komið alivinnuni væl við í dag, og kreppan hevði ikki verið so álvarsom.

Tilmælið frá alivinnuni er, at føroyska alivinnan fær í minsta lagi somu skattaviðurskiftir sum kappingarneytar í grannalondum. Her verður bæði hugsað um reglurnar viðvíkjandi áseting av virðinum av goymsluni á sjónum, og møguleikanum fyri at flyta tap og vinning aftur og fram yvir eitt longri áramál.

**Marknaðaratgongd**

Seinastu árini hava víst, at marknaðaratgongdin til ES hjá føroysku alivinnuni er svikalig.

Alivinnan hevur gjøgnum tvær ákærur um dumping merkt hetta. Og tílík mál kunnu nær sum helst stinga seg upp aftur. Føroyskir alarar hava fingið 33% í tolli fyri síl til ES. Hetta kann henda fyri laksin eisini, uttan at vinnan fær gjørt nakað við støðuna. Í ringasta føri kann hetta viðføra, at alivinnan steðgar upp.

Alivinnan metir, at neyðugt er, at føroyskar vørur uttan forðingar av nøkrum slag kunnu útflytast til ES. Mælt verður tí til, at myndugleikarnir endurskoða handilsviðurskiftini millum Føroyar og ES, herundir at kanna fyrimunir og vansar við ES limaskapi.

Tórshavn tann 5. desember 2003.

**1. ARBEIÐSSETNINGUR** ..... **8**

**2. FØROYSKA ALIVINNAN** ..... **8**

2.1 FØROYSKI BÚSKAPURIN ..... 8
2.1.1 Búskaparligt árin ..... 9
2.2 ÚTSETING AV SMOLTI ..... 10
2.3 FRAMLEIÐSLA ..... 11
2.4 ÚTFLUTNINGUR ..... 12
2.5 ENDURTØKA AV KREPPUNI FYRST Í NÍTIÁRUNUM ..... 13

**3. ILA SJÚKAN** ..... **15**

3.1 KUNNGERÐIR ..... 15
3.1.1 Kunngerð fyri ILA niðurberjing og -yvirvøku ..... 15
3.1.2 Kunngerð fyri rakstur ..... 15
3.1.3 Kunngerð um flutning og um blóðvatn ..... 16
3.1.4 Salmon Proteins ..... 17
3.2 TILMÆLI TIL BROYTINGAR ..... 17
3.2.1 Verkfall ..... 17
3.2.2 Umsiting og sjúkueftirlit ..... 18
3.2.3 Koppingarevni ..... 18
3.3 SAMANUMTIKIÐ ..... 18

**4. ALTJÓÐA MARKNAÐUR** ..... **19**

4.1 ALTJÓÐA ÚTBOÐ ..... 19
4.1.1 Bygnaður ..... 19
4.1.2 Størstu alarar á marknaðinum ..... 21
4.1.3 Eftirspurningur ..... 23
4.1.4 Søguligt mynstur í alivinnuni ..... 24
4.1.5 Niðurstøða ..... 26

**5. KARMAR** ..... **27**

5.1 FÍGGJARTØRVUR ..... 27
5.1.1 Fíggjartørvur til svimjandi fisk ..... 27
5.1.2 Fíggjartørvur til nýggja útseting av smolti ..... 29
5.1.3 Trupulleikin at fáa nýggjan eginpening í alivinnuna ..... 30
5.1.4 Roknskapartøl fyri føroyskar alarar og altjóða alarar ..... 31
5.1.5 Norskar, skotskar og írskar royndir við útlendskum kapitali ..... 33
5.2 VEÐSETING ..... 35
5.3 SKATTAVIÐURSKIFTINI ..... 36
5.3.1 Goymsluáseting ..... 37
5.3.2 Skattaafturbering ..... 37
5.3.3 Framflyting av skattligum halli ..... 37
5.4 MARKNAÐARFORÐINGAR ..... 38

# Yvirlit yvir talvur og myndir

Mynd 1. Útflutningsbýtið í virði fyri ymsar vinnur í Føroyum í 2002. .......... 8
Mynd 2. Virðisketan fyri 50.000 tons av aldum fiski .......... 9
Mynd 3. Útseting av laksasmolti frá 1980 til 2004. .......... 10
Mynd 4. Tøka av laksi í kruvdari vekt. .......... 11
Mynd 5. Tøka av sílum í kruvdari vekt uttan høvd. .......... 12
Mynd 6. Útflutningsvirðið. .......... 13
Mynd 7. Útflutningur av laksi og smoltútseting. .......... 14
Talva 1. Framleiðsla av aldum atlantiskum laksi pr. land. (1.000 tons í rundari vekt ) .......... 19
Mynd 8. Framleiðsla av aldum atlantiskum laksi pr. land (1.000 tons) .......... 21
Talva 2. Topp 30 framleiðarar av alifiski. Nøgdirnar eru í tonsum. .......... 21
Talva 3. Eftirspurningur og marknaðarvøkstur .......... 23
Mynd 9. Søluprísir og framleiðslukostnaður fyri norskar alarar. (Nkr.) .......... 25
Talva 4. Goymsluuppgerð í nøgd medio 2003 .......... 27
Talva 5. Fígging av svimjandi fiski medio 2003 (ikki íroknað fígging til rakstrargøgn) .......... 28
Talva 6. Fígging av nýggjari útseting (ikki íroknað fígging til rakstrargøgn) .......... 29
Talva 7. Soliditetur fyri fimm aljóða alarar og miðal fyri føroyskar alarar .......... 32

# 1. Arbeiðssetningur

Á nevndarfundi í Føroya Havbúnaðarfelag 8 august 2003 varð samtykt, at seta ein arbeiðisbólk at viðgera alivinnuna og koma við tilmælum.

Í arbeiðisbólkinum eru fyri Føroya Havbúnaðarfelag Odd Eliasen, Atli Gregersen og Jan Mortensen. Fyri fíggjarstovnar eru Torbjørn Andreasen, Føroya Banki, Ejvind Mouritsen, Føroya Sparikassi og Virgar Dahl, Tryggingarfelagið Føroyar. Skrivari er Hans Jákup Mikkelsen.

Arbeiðsetningurin hjá bólkinum er at lýsa karmarnar hjá føroysku alivinnuni og at lýsa karmarnar í mun til kappingarneytarnar í grannalondunum.

Bólkurin skal síðani koma við tilmælum um, hvat gerast skal fyri at betra um karmarnar.

# 2. Føroyska alivinnan

## 2.1 Føroyski búskapurin

Einasta vøran, sum er útflutt av týdningi, er fiskur. Útflutningsvirðið hjá alivinnuni er hækkað, síðani alingin byrjaði, og er í dag ein stórur partur av útflutninginum. Mynd 1 vísir útflutningsvirðið býtt á ymsar vinnur í Føroyum í 2002.

Mynd 1. Útflutningsbýtið í virði fyri ymsar vinnur í Føroyum í 2002.




Kelda: Hagstova Føroya

Samlaði útflutningurin í 2002 var 4,1 milliard krónur, harav átti alivinnan 943 milliónir krónur, ella 23%. Fiskivinnan stóð fyri 76% av útflutninginum. Búskapurin í Føroyum má tí metast at vera viðbrekin.

### *2.1.1 Búskaparligt árin*

Seinni í frágreiðingini verður lýst, hvussu framleiðslan av alifiski fer at minka tey næstu tvey árini, og hendan niðurgongd fer at hava eitt búskaparligt árin á føroyska samfelagið. Um prísurin verður á somu legu, sum nú, fer útflutningsvirðið at minka sera nógv. Mynd 2 vísir virðisketuna í tí føroysku alivinnuni.

Mynd 2. Virðisketan fyri 50.000 tons av aldum fiski




Kelda: Bakkafrost p/f

Umleið 780 fólk arbeiða beinleiðis í alivinnuni, harafturat eru arbeiðspláss í hjávinnuni. Niðurgongdin í framleiðsluni fer at hava ávirkan á starvsfolkatalið í alivinnuni. Starvsfólkatalið í liðugtvøru minkar ikki nevnivert, men starvsfólkatalið í kryvjing er beinleiðis tengt at, hvussu stór nøgdin er. Innan smolt- og sjógvaling minkar starvsfólkatalið nakað orsakað av størri eindum og brakklegging. Tilsamans

kann væntast, at ein stórur partur av arbeiðsplássunum bæði í alivinnuni og hjávinnuni hvørvur innan 2 ár.

## 2.2 Útseting av smolti

Myndin niðanfyri vísir útseting av laksasmolti frá 1980 til 2004.

Mynd 3. Útseting av laksasmolti frá 1980 til 2004.




Kelda: Fiskaaling

Mynd 3 vísir, at útsetingin av laksasmolti hevur ment seg øll árini tó undantikið undir kreppuni fyrst í nítiárunum. Útsetingin av smolti hækkaði frá 13 mió smolt í 1998 til 18 mió smolt í fjør. Útsetingin fer at minka niður í lítið og einki og í ár eru 7,5 mió smolt sett á sjógv og næsta ár verða 2 mió smolt sett á sjógv.

## 2.3 Framleiðsla

Framleiðslan fer at lækka vegna vánaligar prísir og lága eginfígging. Eisini ger ILA-sjúkan sítt til, at framleiðslan lækkar. Mynd 4 vísir tøku av laksi.

Mynd 4. Tøka av laksi í kruvdari vekt.




Kelda: Fiskaaling

Mynd 4 vísir, at tøkan av laksi í Føroyum er vaksin støðugt síðani kreppuna. Tøkan í kruvdari vekt var 41.000 tons í 2001 og lækkaði til 37.000 tons síðsta ár. Tøkan verður væntandi á somu legu í ár, men fer síðani at lækka við ferð. Tøkan næsta ár verður væntandi 34.000 tons. Í ár eru 7,5 milliónir smolt sett á sjógv, men ávísir alarar hava ikki fíggingina uppá pláss. Um so verður at eginpeningurin ikki verður fingin til vega, so verður smoltið burturbeint. Hetta er longu hent á smoltstøðum og eisini er smolt í fýra førum burturbeint av sjónum. Orsøkirnar eru, trupulleikarnir við ILA, lágir marknaðarprísir og lítil ella eingin eginfígging. Í 2005 verður tøkan av laksi umleið 20.000 tons, sum merkir, at tøkan fer at lækka 17.000 tons í kruvdari vekt tey næstu tvey árini. Um støðan ikki verður broytt næsta ár verður væntandi, at bert 1 til 3 milliónir smolt fara á sjógv næsta ár, sum merkir, at tøkan í 2006 verður 6.000 tons.

Mynd 5. Tøka av sílum í kruvdari vekt uttan høvd.




Kelda: Fiskaaling

Mynd 5 vísir, at Føroyar hava havt eina støðuga tøku av sílum á umleið 1.000 tons. Men tøkan í fjør og í ár hevur verið umleið 8.000 tons í kruvdari vekt avhøvdað. T.v.s. at tøkan er vaksin sera nógv yvir stutta tíð.

Orsøkirnar eru, at í 1999 hækkaðu prísirnir í Japan, og í 2000 kom ILA-sjúkan, og síl bróta ikki út vegna ILA, men eru bert berarir av sjúkuni. Hetta viðførdi, at alarar løgdu framleiðsluna um og fóru í nógv størri mun at framleiða síl. Norra hækkaði framleiðsluna nógv um somu tíð, og tí varð útboðið ov stórt, og prísirnir fullu. Allir alarar mistu pening, og vendu tí aftur til at framleiða laks. Higartil í ár er 1 millión sílasmolt sett á sjógv. Mett verður tí, at tøkan tvey tey næstu árini fer at minka niður á 3.000 tons.

## 2.4 Útflutningur

Mynd 6 vísir útflutningsvirðið fyri alifisk. Myndin vísir, at virðið hevur verið støðugt tey seinastu 4 árini. Virðið hevur ligið á umleið 900 milliónum krónum. Virðið á laksinum er minkað, men hinvegin er útflutningsvirðið á sílum hækkað. Vert er at býta merki í, at nøgdin í 2000 bert var 26.000 tons, men prísurin var so mikið høgur, at útflutningsvirðið var á hædd við hini árini. Virðið í fjør var 943 milliónir krónur. Útflutningsvirðið verður

á leið tað sama í ár, men síðani fer tað at falla. Ilt er tó at meta um, hvat útflutningsvirðið verður í framtíðini, tí avgerandi verður, hvat prísurin verður. Men verður ein miðalprísur á 20 kr/kg brúktur, fer útflutningurin at minka niður á 460 mió. kr. í 2005 og 120 mió kr. í 2006, sum víst í mynd 6.

Mynd 6. Útflutningsvirðið.



kelda: Maritech p/f 1996-2002, Forsøgn gjørd av Føroya Havbúnaðarfelag

## 2.5 Endurtøka av kreppuni fyrst í nítiárunum

Mynd 7 vísir menningina í alivinnuni síðani 1982. Myndin vísir, at útflutningurin er nærum bara hækkaður í tíðarskeiðinum. Hann tók dyk á seg síðst í 80unum, men fall nakað undir kreppuni. Síðani kreppuna hevur hann verið fyri stórum vøkstri.

Alivinnan er aftur komin í kreppu, og hon minnir ikki sørt um kreppuna fyrst í 90´unum. Tó er kreppan størri í dag, tí framleiðslan er meira enn tvífalt so stór. Orsøkin seinast var, sum nú, lágir marknaðarprísir og sjúka. Tá hendi ein bygnaðarbroyting í alivinnuni, og talið av alarum fall nógv. Samstundis fall útflutningurin, og tað sær út til, at útflutningurin eisini fer at minka hesuferð,

møguliga heilt niður á 6.000 tons í 2006. Hinvegin verða karmarnir ligiligari og bilbukt fast við sjúkuna, so kann fallið verða minni, og skjótari vil alivinnan reisa seg aftur.

Mynd 7. Útflutningur av laksi og smoltútseting.




Kelda: Fiskaaling

Undir fyrru kreppuni var samtykt at seta ein endurgjaldsgrunn á stovn, fyri at sjúkur fiskur kundi takast úr sjónum beinanvegin, uttan at alarin beinleiðis hevði tap av tí. Hesin grunnur datt niðurfyri, tá ið tað vísti seg, at tamarhald var fingin á sjúkunum, sum tá vóru. Tað varð tíverri ikki lagt upp fyri, at nýggjar sjúkur kundu stinga seg upp. Í dag er støðan hon, at ein endurgjaldsgrunnur hevði verið kærkomin. Eingin tílíkur er, og spurningurin er, um ikki alivinnan aftur eigur at seta ein tílíkan grunn á stovn fyri at verja seg ímóti komandi sjúkum.

Endamálið við einum endurgjaldsgrunni er at geva endurgjald fyri, at sjúkur fiskur beinanvegin verður tikin úr sjónum og burturbeindur, men eisini fyri fisk, sum kanska ber sjúkuna, men ikki er brotin út. Hetta fyri at verja onnur alibrúk ímóti at verða smittað. Ein alari vil tó ongantíð taka frískan fisk úr sjónum, tí tá verða virðir beinleiðis burturbeind. Men um so er, at fiskur verður burturbeindur fyri at verja onnur alibrúk og harvið alivinnuna sum heild, er tað ein solidaritetsspurningur, og her kemur endurgjaldsgrunnurin til sín rætt.

# 3. ILA sjúkan

ILA sjúkan varð fyrstu ferð staðfest í Fuglafirði í mars 2000. Í dag herjar ILA sjúkan um alt landið, og alivinnan hevur higartil mist umleið 250 milliónir krónur orsakað av sjúkuni. Alivinnan kemur framhaldandi at hava tap til tamarhald er á ILA sjúkuni. Vinnumálaráðið hevur sett kunngerðir í verk, sum skulu niðurberja sjúkuna og sum skulu forða fyri smittuspjaðing. Eisini setti Føroya Havbúnaðarfelag ein arbeiðisbólk í 2002 at skriva eina niðurberjingarætlan, sum er send ES til góðkenningar. Við smávegis broytingum kann hendan ætlan góðkennast. Ein týðandi partur av niðurberjingini er eitt koppingarevni.

## 3.1 Kunngerðir

Tvær kunngerðir hava verið til hoyringar og verða settar í gildi í næstum. Tær eru kunngerð um ILA niðurberjing og -yvirvøku og kunngerð um rakstur av alistøðum á sjónum. Hesar kunngerðir saman við undanfarnu kunngerðum eru ein fortreyt fyri at fáa loyvi at koppseta. ILA sjúkan er ein lista 1 sjúka, sum merkir, at hon skal niðurberjast og ikki viðgerast.

### *3.1.1 Kunngerð fyri ILA niðurberjing og -yvirvøku*

Kunngerðin krevur m.a., at royndir vera tiknar á øllum sjógvalistøðum alt árið við tí endamálið at leita eftir ILA.

Sjúkur fiskur skal avtakast innan 14 dagar, og fiskur í øðrum ringum skal takast innan fyri eitt stutt tíðarskeið. Tá ið fiskur verður tikin úr sjónum skjótt, vil smittu-trýstið minka sera nógv.

### *3.1.2 Kunngerð fyri rakstur*

Í kunngerðini fyri rakstur verður fastlagt, hvussu alast skal á sjónum í framtíðini. Størsta broytingin er árgangsskiljing og økishvíld. Vinnumálaráðið hevur allýst, hvussu mong aliøkir eru í Føroyum. Eitt aliøki er ein fjørður, eitt sund ella ein vík.

Tó Haraldssund, Hvannasund og Sundalagið verða býtt sundur í tvey aliøkir hvørt. Á økjunum er bert møguligt at seta ein árgang út hvørja ferð. Síðani skal hesin árgangur alast fram til tøku. Fiskurin skal síðani takast, og økið liggja og hvíla í 2 mánaðar, áðrenn nýggj útseting verður framd. Um ILA sjúka er, skal økið liggja og hvíla í 6 mánaðar. Hetta vil minka um vágan fyri sjúkuspjaðing, tí smittan kann ikki førast frá einum árgangi til tann næsta. Eisini byrgir kunngerðin upp fyri, at økið verður strongt ov langa tíð.

Kunngerðin ásetir mest loyvda tættleika í einum ringi, tí høgur tættleiki viðførir strongd, og sjúka brýtur skjótari út í strongdum fiski.

Lúsateljing verður innført. Í Norra er ásett, at fiskur skal viðgerast fyri lús, um fiskur sæst, sum hevur 10 lús. Royndir vísa, at laksur við nógvari lús er meira útsettur fyri sjúku.

Alifeløg skulu byggja eina landsstøð fyri hvørt alibrúk. Endamálið er at steðga sjúkuspjaðing. Landsstøðin skal vera avbyrgd, har slúsa skal vera fyri starvsfólki, soleiðis at smitta ikki verður drigin við inn og út av alibrúki. Sjúkur og sjálvdeyður fiskur skal viðgerast á landsstøðini. Landsstøðin skal hava ein dagskapasitet á 1% av biomassanum á sjónum, soleiðis at sjúkur fiskur kann koma til høldar, um sjúkuútbrot er.

Alarin skal hava eina tilbúgvingarætlan, sum nágreiniliga prógvar, at alarin hevur møguleika til at taka sjúkan fisk úr sjónum sera skjótt.

Tilbúgvingarætlanin umfatar eisini, hvussu alarin skal forða fyri, at fiskur sleppur. Alarin skal tí lýsa, hvørji krøv verða sett til útgerðina á sjónum, og hvørjar mannagongdir skulu innførast fyri at tryggja, at fiskur ikki sleppur.

### *3.1.3 Kunngerð um flutning og um blóðvatn*

Kunngerðin um flutning frá 8. juli 2003 sigur, at loyvi skal útvegast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyri flutning av alifiski og aliútgerð. Orsøkin er, at eftirlit skal vera við øllum flutningi, sum kann økja smittuvágan. Flutningur við brunnbáti verður nú gjørt við lokaðum ventilum. Øll aliútgerð verður sóttreinsað áðrenn flutning, og brunnbátar og flutningsakfør verða sóttreinsað eftir forskriftum

frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Blóðvatn verður uppsamlað og viðgjørt.
Tað verður hildið eitt vakið eyga við øllum smittukeldum í sambandi við flutning, tó enn manglar at gjøgnumføra hetta í verki hjá flutningsakførum, sum flyta fisk til útflutnings og á fiskavirkjum, sum ikki framleiða alifisk. Eisini manglar uppsamling av frárensluvatni á avskipingarhavnum.

### *3.1.4 Salmon Proteins*

Salmon Proteins, sum er stovnað av alivinnuni, skal taka sær av øllum slógvi frá alivinnuni, eisini sjúkum fiski. Sjúkur og sjálvdeyður fiskur verður malin á landsstøðini og súrgaður í 24 tímar fyri at gera av við smittuna. Síðani verður fiskurin fluttur til Salmon Proteins og hitaviðgjørdur, áðrenn hann verður útfluttur til biogassframleiðslu.

## 3.2 Tilmæli til broytingar

Omanfyri nevndu kunngerðir leggja góðar karmar fyri niðurberjing av ILA, tó ávís viðurskiftir eru ikki komin í rættlag enn. Tey eru (i) alivinnan í verkfalli, (ii) almenn umsiting og sjúkueftirlit og (iii) koppingarevni.

### *3.2.1 Verkfall*

Verkfallið í ár og í 2001 á føroyska arbeiðsmarknaðinum rakti alivinnuna sera hart. Verkføllini hava havt óbótaligan skaða bæði búskaparliga og heilsuliga.
Í sambandi við sjúkustøður er tað ein beinleiðis vanlukka, at alibrúk ikki sleppa at loysa átrokandi, sjúkufyribyrgjandi uppgávur, sum eru álagdar teimum við lóg. Hetta merkir, at smittuvandin frá sjúkuraktum alibrúkum økist munandi, og tey gerast ein hóttan fyri alla vinnuna.
Tað er tí alneyðugt, at myndugleikin við kunngerð ella lóg fær tryggjað, at sjúkurakt aliøkir ótarnað kunnu loysa allar uppgávur sínar, eisini í einari verkfallsstøðu.

### *3.2.2 Umsiting og sjúkueftirlit*

Fleiri kunngerðir undan hesari hava verið í gildi, men hava í ávísum førum ikki verið gjøgnumførdar. Serliga verður hugsað um, at sjúkur fiskur hevur fingið loyvi at staðið í sjónum alt ov langa tíð, og eisini hava smittuspjaðandi flutningstól verið nýtt. Alt ov lítil arbeiðsorka og peningalig orka er sett av til hetta arbeiðið frá almennari síðu. Prísirnir, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan tekur fyri hesar tænastur, eru alt ov høgir og kunnu als ikki góðtakast. Her skal nevnast, at aðrar vinnur í Føroyum fáa slíkar tænastur ókeypis. Kanningar og sýnir álagdar í kunngerðum eru ein búskaparligur spurningur hjá tí almenna.

### *3.2.3 Koppingarevni*

Føroya Havbúnaðarfelag metir tað vera alneyðugt at fáa koppingarevni til at niðurberja ILA sjúkuna. Tvey koppingarevnir eru - annað í Kanada og hitt í Norra. Í Norra er koppingarevnið enn á royndarstigi, meðan kanadiskir alarar koppseta laksin. Royndirnar úr Kanada eru nakað misjavnar, men kanadiar meta, at hon verjir 70% av fiskinum. Kanada selir allan sín laks á heimamarknað ella í USA, og har er koppingaevnið góðkent. ES hevur ikki góðkent nakað koppingarevni, og tað hevur tí sera stóran skund, at landsdjóralæknin sendir umsókn til ES um at fáa loyvi at koppseta ímóti ILA.

## 3.3 Samanumtikið

Omanfyri nevndu kunngerðir, sum eru á veg, eru ein staðfesting av, at nógv verður gjørt fyri at basa ILA sjúkuni. Óiva fara tiltøkini rættiliga skjótt at føra til, at ILA sóttin hasar av.

Tiltøkini koma, at byrja við, at hava ein høgan kostnað. Umframt kostnaðarmiklar tillagingar og útbyggingar vil ein skjót tøka og burturbeining av sjúkum fiski í fyrsta umfari føra til, at tey sjúkuraktu alifeløgini fáa ein fíggjarligan lúsing, sum tey møguliga ikki tola, sjálvt um fíggjarligt atlit er tikið í kunngerðunum.

# 4. Altjóða Marknaður

Endamálið við hesari altjóða lýsingini av alivinnuni er at skapa grundarlag fyri at meta um prísgongd tey næstu tvey til trý árini. Alneyðugt er, at prísurin hækkar, fyri at tað skal vera alivinnuni lív laga.

## 4.1 Altjóða útboð

Marknaðarprísurin verður avgjørdur út frá útboði og eftirspurningi. Fyri at kunna spáa um framtíðarprísir er tí neyðugt at meta um, hvussu útboðið og eftirspurningurin verður í nærmastu framtíð.

Útboðið verður kannað soleiðis, at fyrst verður hugt eftir bygnaðinum á marknaðinum, t.v.s hvørji eru framleiðaralondini, og hvør nøgd verður framleidd. Síðani verða teir stóru altjóða alararnir lýstir. Mett verður um eftirspurningin í ávikavist ES, USA og Japan. Til síðst verður hugt eftir, hvussu alivinnan háttar sær og út frá tí mynstrinum meta um framtíðina.

### *4.1.1 Bygnaður*

Eitt stórt tal av laksaalarum hevur verið í heiminum. Talið er lækkað tey seinastu árini vegna samanleggingar og keyp av feløgum. Ferð er komin á hesa gongd tey síðstu árini, tí tey stóru altjóða alarafeløgini eru sett á partabrævamarknaðin og hava har fingið atgongd til eina peninganøgd, sum ikki hevur verið í vinnuni áður. Hesi feløg eru vorðin altjóða feløg, tí tey ala og selja um allan heimin.

Styrkjan, keyp og samanleggingar av alarum fer at halda fram, men eydnan fyri hesi stóru feløg vil altíð liggja í stýringini av hvørjum einstøkum alibrúki, og vágin vil altíð vera sera stórur. Ein steðgur er tó í løtuni í hesi gongd, tí alivinnan er rakt av sera lágum prísum og harvið vánaligum úrslitum.

Allir alarar framleiða eina standard vøru, sum er atlantiskur laksur. Framleiðaralondini eru Noreg, Skotland, Írland, Kanada, Kili og Føroyar. Aktørarnir á marknaðinum eru framleiðaralondini av laksi, tí alarin í hvørjum einstøkum landi hevur sama umdømi, sum landið hevur. Tí ber til at samanlíknað framleiðaralondini sum kappingarneytar.

Talva 1. Framleiðsla av aldum atlantiskum laksi pr. land. (1.000 tons í rundari vekt )

| | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norra | 156 | 141 | 170 | 207 | 249 | 292 | 316 | 343 | 411 | 422 | 418 | 444 | 471 | 471 | 471 |
| Stórabretland | 41 | 36 | 45 | 64 | 72 | 83 | 100 | 111 | 126 | 129 | 149 | 142 | 145 | 147 | 147 |
| Írland | 8 | 10 | 11 | 12 | 12 | 14 | 16 | 17 | 19 | 20 | 23 | 23 | 23 | 23 | 23 |
| Føroyar | 18 | 17 | 18 | 15 | 8 | 17 | 21 | 19 | 36 | 30 | 50 | 45 | 46 | 40 | 24 |
| Ísland | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 3 | 4 | 5 | 4 | 10 | 12 | 16 |
| Evropa | 226 | 207 | 247 | 301 | 344 | 409 | 456 | 493 | 595 | 605 | 645 | 658 | 695 | 693 | 681 |
| Kanada | 13 | 17 | 23 | 30 | 32 | 34 | 48 | 59 | 67 | 80 | 97 | 94 | 103 | 103 | 103 |
| USA | 9 | 10 | 13 | 14 | 17 | 18 | 19 | 21 | 23 | 22 | 24 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| Kili | 16 | 24 | 29 | 34 | 54 | 77 | 97 | 107 | 102 | 168 | 245 | 268 | 277 | 312 | 343 |
| Australia | 3 | 3 | 4 | 5 | 6 | 8 | 8 | 8 | 10 | 14 | 16 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| Tilsamans | 267 | 261 | 316 | 384 | 453 | 546 | 628 | 688 | 797 | 889 | 1027 | 1048 | 1103 | 1136 | 1155 |
| Broyting | | -2,2% | 21,1% | 21,5% | 18,0% | 20,5% | 15,0% | 9,6% | 15,8% | 11,5% | 15,5% | 2,0% | 5,3% | 3,0% | 1,7% |

Kelda: Kontali, FEAP og ISFA.

Talva 1 vísir framleiðsluvøkstur fyri aldan atlantiskan laks. Framleiðslan er hækkað við ferð við einum árligum vøkstri á meira enn 20% frá 1993 til 1996. Vøksturin frá 1997 til 2001 var 15%. Tilber at framrokna framleiðsluna tvey ár, tí framleiðaralondini vita, hvussu nógv smolt verður sett á sjógv. Forsøgnin sigur, at vøksturin verður lágur. Seinasta ár var vøksturin bert 2% og í nærmastu framtíð verður vøksturin ímillum 2% og 5%. Tó ein nýggj forsøgn er gjørd av Kontali Analyse A/S, og hon sigur, at Kili vil hækka framleiðsluna við 24% næsta ár. Hetta vil viðføra ein heimsvøkstur á 6% til 7%.

Mynd 8 vísir menningina av framleiðsluni av aldum atlantiskum laksi. Norra er nógv tann størsti framleiðarin, men tann norski vøksturin er steðgaður tey síðstu árini. Orsøkin er fóðurkvotur settar av tí norska myndugleikanum. Ein stórur vøkstur hevur verið í øðrum londum. Miðalvøksturin tildømis frá 1998 til 2001 fyri Kili varð 24%, Kanada 13,4% og Føroyar 29,2%. Størsta orsøkin til hendan vøkstur er, at framleiðsluvøksturin í Norra er steðgaður, tí altjóða feløgini og íleggjarar eru farnir til lond, har eingin forðing fyri vøkstri er, og har gott er at ala. Í Evropa verður ikki væntað nakar vøkstur, tí allir alarar framleiða við undirskoti í løtuni. Sostatt kann væntast, at ein niðurgongd verður í framleiðsluni í Evropa, og ábendingar úr eitt nú Norra staðfesta hesa gongd. Hetta vil viðføra, at tørvurin um tvey ár ikki verður

nøktaður í Evropu, og tí hækkar prísurin á feskum laksi. Tí er væntandi, at Kili vil senda laks til Evropu fyri at nøkta tørvin, men Kili hevur í løtuni bert møguleika at selja frystar úrdráttir, og tí vil tann kilenski laksurin ikki nøkta feskfiskamarknaðin, men vil seta framleiðarar av frystum laksaportiónum undir harða kapping.

Mynd 8. Framleiðsla av aldum atlantiskum laksi pr. land (1.000 tons)




Kelda: Kontali, FEAP og ISFA.

### *4.1.2 Størstu alarar á marknaðinum*

Eingin eginfígging er eftir í føroysku alivinnuni, og alarar hava í ár stórt undirskot av hvørjum kilo, sum framleitt verður. Tí er ikki í væntu, at íleggjarar koma, sum hava vinning her og nú fyri eyga. Teir íleggjarar, sum kunnu hugsast koma til Føroya, eru tey stóru altjóða alarafeløgini, sum hava ein langtíðaráhuga at vera í Føroyum.

Talva 2. Topp 30 framleiðarar av alifiski. Nøgdirnar eru í tonsum.

| Nr | Feløg | Heimstaður | Nøgd | Alivirksemi |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Nutreco Holding N.V. | Niðurlond | 200.000 | Norra, Skotland, Kili, Kanada (Marine Harvest, Skretting, Hydro) |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2 | Pan Fish ASA | Norra | 88.008 | Norra, Skotland, Kanada, USA, Føroyar |
| 3 | Fjord Seafood ASA | Norra | 66.435 | Norra, Skotland, Kili, USA |
| 4 | Stolt Sea Farm S.A. | Luxembourg | 59.600 | Norra, Skotland, Kili, Kanada, USA |
| 5 | AquaChile S.A. | Kili | 49.000 | Kili |
| 6 | Cermaq ASA | Norra | 47.800 | Skotland, Kili, Kanada (Ewos) |
| 7 | Salmones Multiexport S.A. | Kili | 30.000 | Kili |
| 8 | Cultivos Marinos Chiloé S.A. | Kili | 27.000 | Kili |
| 9 | Salmones Antartica S.A. | Japan | 25.000 | Kili |
| 10 | Heritage Aquaculture Inc. S.A. | Kanada | 25.000 | Kanada, Kili |
| 11 | Sjøtroll AS | Norra | 22.889 | Norra, Hetland |
| 12 | Pesquera Los Fjordos S.A. | Kili | 22.000 | Kili |
| 13 | Dåfjord Laks AS | Norra | 21.000 | Norra |
| 14 | Scottish Sea Farms Ltd. | Norra | 20.900 | Skotland |
| 15 | Pescanova S.A. | Spania | 20.000 | Kili |
| 16 | Midnor Group AS | Norra | 18.788 | Norra |
| 17 | Aquas Claras S.A. | Kili | 18.000 | Kili |
| 18 | Seafarm Invest AS | Norra | 17.159 | Norra |
| 19 | Salmones Pacific Star Ltda. | Kili | 17.000 | Kili |
| 20 | Vestlax P/F | Føroyar | 17.000 | Føroyar, Ísland |
| 21 | Hydrotech-Gruppen AS | Norra | 16.500 | Norra |
| 22 | Invertec | Kili | 15.000 | Kili |
| 23 | SalMar AS | Norra | 14.500 | Norra |
| 24 | Bremnes Seashore AS | Norra | 14.000 | Norra |
| 25 | Grieg Seafood AS | Norra | 13.000 | Norra |
| 26 | Camanchaca S.A. | Kili | 13.000 | Kili |
| 27 | Hjaltland Seafarms Ltd. | Norra | 12.000 | Hetland |
| 28 | Marine Farms ASA | Norra | 11.800 | Norra, Skotland, Kili |
| 29 | Fjordlaks Aqua AS | Norra | 11.000 | Norra |
| 30 | Aqua Farms AS | Norra | 10.000 | Norra |
| | Tilsamans | | 943.379 | |

Kelda: Intrafish, Report on Top 30 fish farming producers, 21 may 2003.

Tey størstu framleiðaralondini eru nevnd omanfyri og tey eru Norra, Kili, Skotland, Kanada, Føroyar og Írland. Í hesum londum hava nakrir alarar vaksið nógv um sítt virksemi. Fyri nøkrun árum síðani var alivinnan ein húsmansvinna, sum innihelt eina

ørgrynnu av lítlum og spjæddum alarum. Enn eru nakrir smáir og miðalstórir alarar eftir, men vinnan er í dag stýrd av nøkrum fáum sera stórum alarum. Sí talvu 2 omanfyri.

Tredivu alarar stýra vinnuni. Hesir hava umleið 90% av heimsframleiðsluni. Seks teir størstu alararnir eru Nutreco, Pan Fish, Fjord Seafood, Stolt Sea Farm, AquaChile og Cermaq, og hesir ráða yvir 53% av heimsframleiðsluni. Fleiri og fleiri kilenar eru ímillum teir heilt stóru alararnar. Seks kilenskir alarar verða nú roknaðir sum miðalstórir alarar og hava eina framleiðslunøgd í part ímillum 20.000 og 30.000 tons. Til samanlíkningar var bara ein kilenskur alari ímillum teir 30 størstu alararnar í 2000.

### *4.1.3 Eftirspurningur*

Framleiðslan fer í framtíðini at vaksa 2% til 5% um árið, og tí er neyðugt at vita, um vøksturin í eftirspurningi er hægri. Tað er neyðugt, um prísurin skal hækka. Evropearir eftirspyrja umleið helvtina av heimsframleiðsluni av aldum atlantiskum laksi. Hinir báðir stóru marknaðirnir fyri laks eru USA og Japan.

Talva 3. Eftirspurningur og marknaðarvøkstur

| Marknaðir | Nøgd | Prosent | Marknaðarvøkstur |
|---|---|---|---|
| ES | 493.000 | 51% | 2,5% |
| USA | 271.200 | 28% | 15,0% |
| Japan | 64.700 | 7% | 0,0% |
| Onnur lond | 133.100 | 14% | 0,0% |
| Tilsamans | 962.000 | 100% | 5,5% |

Kelda: Kontali

Talva 3 vísir, at vøksturin í ES er 2% til 3%. ES marknaðurin er mettaður, og allir framleiðara kappast við prísi. Hetta er ein orsøk til, at prísurin støðugt lækkar. USA veksur skjótt, og prísurin fyri laksin er tí á einum væl hægri støði enn í Evropa. Kili er einasta framleiðaraland, sum selir stórar nøgdir til USA. Kili heystar tí væl av tí høga prísi, sum er í USA og hevur tí fíggjarliga styrki at vaksa um framleiðsluna.

Kili er tí ein hóttan í nærmastu framtíð. Japan hevur staðið í stað í nógv ár. Eingin tøl eru fyri restina av heiminum, og tí verður hann settur til null, tó ábendingar eru um, at Russland er í stórum vøkstri. Hetta gevur ein árligan heimsvøkstur á 5,5%. Tað merkir, at um vøksturin í útboðnum er størri enn hetta, vil prísurin í framtíðini vera undir trýsti. Sum sagt frá áður, verður mett, at framleiðsluvøksturin verður 2% til 5%, og tí vil prísurin møguliga hækka aftur. Men hinvegin um forsøgnin hjá Kotali verður fylgd, verður framleiðsluvøksturin 6% til 7%, sum merkir, at prísurin verður verandi lágur.

Allir evropeiskir framleiðarar eru í somu støðu. Eingin vøkstur verður í næstu framtíð, tí allir framleiða alifisk við undirskoti. Tí kann væntast, at framleiðslan og harvið útboðið lækkar, og alarar fara á húsagang. Framleiðslan í Norra hækkar umleið 10% í ár, men vøksturin vil síðani steðga. Sama mynd er í Skotlandi og Írlandi. Allar íløgur bíða í løtuni. Um hendan støðan heldur sær, kann væntast, at framleiðslan minkar so mikið, at eftirspurningurin á ES marknaðinum fyri feskar úrdráttir ikki verður nøktaður og vil tí enda við, at prísurin hækkar, tá ein tíð er fráligin.

### *4.1.4 Søguligt mynstur í alivinnuni*

Ein annar háttur at meta um framtíðina er at hyggja eftir alisøguni og møguliga finna eitt mynstur í framleiðsluni. Mynd 9 er gjørd út frá allari framleiðsluni av alifiski í Norra. Miðal søluprísir og miðal framleiðslukostnaður pr kilo fyri allar norskar alarar frá 1985 til 2001 eru brúktir, og ein meting er eisini gjørd av kostnaði og søluprísi fyri 2002 og 2003.

Tey síðstu árini hevur alivinnan merkt eitt sera stórt sveiggj í søluprísum. Prísurin var eitt tíðarskeið í 2000 omanfyri 35 kr/kg, og longu á heysti í 2001 var prísurin umleið 16 kr/kg. Tað eru fleiri tílík dømir, har prísurin hevur sveiggjað nógv innan stutta tíð.

Mynd 9 vísir, hvussu prísurin og kostnaðurin støðugt lække. Sannlíkt er, at hetta mynstrið kemur at halda sær í framtíðini. Framleiðslukostnaðurin er lækkaður sera nógv vegna menning av tøkni og mannagongdum og eina sera stóra betring í

produktiviteti.

Mynd 9. Søluprísir og framleiðslukostnaður fyri norskar alarar. (Nkr.)




Kelda: Fiskeridirektoratet og Atle G. Guttormsen. Forecasting Salmon Prices. March 26 2002

Gloppið millum linjurnar í Mynd 9 vísir vinningin pr kilo. Vinningurin er rímiliga støðugur, men har eru sveiggj frá stórum vinningi til lítlan ella ongan vinning á 2 til 3 ár, tildømis frá 1994 til 1996. Orsøkin til hetta mynstrið er tíðina tað tekur frá avgerðini at vaksa um framleiðsluna, til framleiðslan rakar marknaðin. Vakstrartíðin er 2 til 3 ár. Vinningurin var høgur í 1994, og allir alarar vóru bjartskygdir og avgjørdu at økja um framleiðsluna. Hendan framleiðslan var tvey ár í sjónum og rakti marknaðin í 1996. Prísirnir á marknaðinum fullu tí vegna stórt útboð, og vinningurin hvarv. Eftir hetta vórðu alarar svartskygdir og minkaðu smoltútsetingina. Tvey til trý ár seinni, í 2000, rakti hendan lítla nøgdin marknaðin, og prísirnir hækkaðu. Í 2000 endurtók søgan seg, nevniliga við at allir alarar aftur vóru bjartskygdir og hækkaðu framleiðsluna Hendan nøgdin rakti marknaðin í fjør og í ár, og tí eru prísirnir lágir og eingin vinningur. Í løtuni eru ábendingar um, at lítið av

smolti verður sett á sjógv. Tað vil siga, at um tvey ár, í 2005, verður ov lítið av alifiski á marknaðinum, og tí fara prísirnir at hækka, og vinningurin verður betri. Út frá hesum tilfari ber til at meta, at betri tíðir vera aftur í alivinnuni í 2005 og 2006.

Hetta hevur verið mynstrið í alivinnuni øll árini. Soleiðis háttar vinnan sær, og tí verður vinnan kallað fyri ein vinna ”of boom and bust”.

Nógv hevur verið tosað um, hví prísurin hækkaði so nógv í 2000. Orsøkin var, at Norra, sum tann størsti framleiðarin, var álagdur at fylgja fóðurkvotum. Hetta gjørdi, at norskir alarar ikki fingu loyvi til at vaksa sum teimum lysti um framleiðsluna og heldur ikki ímun til tann øktað eftirspurningin. Samstundis var tann skotska framleiðslan avmarkað vegna ILA. Tí var eftirspurningurin á tí evropeiska marknaðinum ikki nøktaður, og prísurin hækkaði sera nógv eitt stutt tíðarskeið í Evropu.

Stóri vøksturin í framleiðsluni um allan heim prógvar, at eingin forðing er fyri vøkstri. Ein ørgrynna av ónýttum aliøkjum eru um allan heim. Framleiðslukostnaður vil tí vera tann mest týðandi orsøkin til framleiðsluvøkstur og harvið marknaðarprísir í framtíðini.

#### *4.1.5 Niðurstøða*

Ein ábending er um, at alivinnan stendur á botni nú, og at prísútlitini tey næstu tvey til trý árini eru rímilig. Tí er tað alneyðugt, at føroyska alivinnan hevur bestu fortreytir at virka undir, soleiðis at ikki kemur hóttafall á hana. Myndugleikarnir mugu tryggja, at bestu karmar vera skaptir til at kunna endurreisa vinnuna aftur soleiðis, at hon kann heysta av tí góða ráki, sum møguliga verður um tvey ár.

# 5. Karmar

Í hesum kapitli verða karmarnir fyri føroysku alivinnuna lýstir.

## 5.1 Fíggjartørvur

### *5.1.1 Fíggjartørvur til svimjandi fisk*

Eginpeningurin við ársenda í 2000 var 500 milliónir krónur. Bókaði eginpeningurin 1. juli 2003 var 227 milliónir krónur. Við verandi gongd verður eingin eginpeningur eftir, tá ið árið er runnið. Um ein varislig meting verður gjørd av bókaða støðisfænum í alivinnuni í dag, er eingin eginpeningur eftir. Goymslan av livandi fiski medio 2003 er víst í Talvu 4 niðanfyri.

Talva 4. Goymsluuppgerð í nøgd medio 2003

| Árgangir | Stk | Miðalvekt | Nøgd | Virði |
|---|---|---|---|---|
| Smolt (< 1 kg) | 11.987 | 0,415 | 4.972 | 210.757 |
| alifiskur 1 – 3 kg | 8.922 | 2,227 | 19.872 | 336.952 |
| Tøkubúgvin 3+ kg | 3.985 | 4,235 | 16.877 | 237.164 |
| Tilsamans | 24.894 | 1,676 | 41.721 | 784.873 |

Kelda: Føroya Banki og Føroya Sparikassi.

Talva 4 vísir, hvat er í sjónum. Nøgdin í sjónum er 41.721 tons og talið er 24,9 milliónir stykkir. Fiskurin stendur í 785 milliónum krónum. Tá ið hann er liðugur at framleiða, er virðið 909 milliónir krónur.

Talva 5. Fígging av svimjandi fiski medio 2003 (ikki íroknað fígging til rakstrargøgn)

| Uppgerð | Støðan í dag | Býtið í prosent | Hugsað dømi | Hugsað dømi |
|---|---|---|---|---|
| 1 veðrættur | 805.000 | 78% | 510.250 | 65% |
| Fóðurfígging | 225.000 | 22% | 117.750 | 15% |
| Eginpeningur | 0 | 0% | 157.000 | 20% |
| Fígging íalt | 1.030.000 | 100% | 785.000 | 100% |
| Gjaldførishall | 245.000 | | 0 | |
| Tilsamans | 785.000 | | 785.000 | 100% |
| Meirfígging | 124.000 | | 124.000 | |
| Tilsamans | 909.000 | | 909.000 | |

Kelda: Føroya Banki,Føroya Sparikassi, Havsbrún, Ewos og Skretting.

Talva 5 vísir, at fígging íalt er 1.030 mió. kr. og sum er fíggjaður sum víst omanfyri. Grundað á vanligan rakstur, t.v.s. uttan sjúku og grundað á vanligan prís hevði fíggjartørvurin medio 2003 eftir vanligum fyritreytum verið 785 mió. kr. Hetta merkir, at í fíggingini í dag liggur eitt gjaldførishall á 245 mió. kr, sum antin skal inntjenast ella sanerast. Gjaldsførishallið er bert av rakstrarfíggingini. Gjaldsførishallið er komið av, at alivinnan í longri tíð hevur havt sjúkutrupulleikar, og at søluprísurin í gott tvey ár hevur verið lægri enn framleiðslukostnaðurin. Eisini hevur skatturin, sum nevnt aðrastaðni, havt ávirkan. Tørvurin av verandi fiski í sjónum var størstur í august 2003, tá ið hann var 909 mió. kr. T.v.s. at meirfíggingin av verandi fiski var 124 mió. kr.

Samanumtikið er støðan í dag, at peningastovnarnir fíggja 78%, fóðurútvegarar 22% og alarar einki. Tó eru hesi tøl rættiliga ójøvn frá felag til felag. Hetta er ein sera óheppin støða, og hvørki peningastovnar ella fóðurútvegarar vilja fíggja virksemið uttan eginpening. Treytað av at nøktandi eginpeningur er til staðar, og at viðurskiftini hjá felagnum annars eru nøktandi, harí peningastovnar fáa veð í aliloyvunum, er útlit til, at peningstovnarnir kunnu fíggja umleið 65% av fiskavirðinum - tó er hetta ymiskt frá felag til felag. Sostatt skal fóðurútvegarin og íleggjari/alari fíggja 35%. Mett verður, at tørvurin til eginpening er ímillum 100 og 150 milliónir krónur, tá hædd er tikin fyri teimum alarum, sum enn hava nakað av eginpeningi.

### *5.1.2 Fíggjartørvur til nýggja útseting av smolti*

Í fjør vóru 18 milliónir smolt sett á sjógv. Í ár eru longu á leið 7,5 mió. smolt sett á sjógv, men alarar hava ikki fíggingina uppá pláss, tó tað verður arbeitt við tí. Um so verður, at eginpeningurin ikki verður fingin til vega, so verður smoltið burturbeint. Hetta er longu hent á smoltstøðum og eisini er smolt í fýra førum burturbeint á sjónum. Niðanfyri er fíggjartørvurin lýstur fyri nýggja útseting av smolti. Tvey dømir eru lýst, har annað er ein útseting á 7,5 mió. smolt, sum er eitt gott boð uppá, hvat verður sett út í ár, og hitt dømið er, hvat fíggjartørvurin hevði verið, um alivinnan skuldi hildið fram, sum hon hevur gjørt við ongari minking av framleiðslu, t.v.s. við einari útseting á 18 mió. smolt.

Talva 6. Fígging av nýggjari útseting (ikki íroknað fígging til rakstrargøgn)

| Uppgerð | Nýggj útseting 7,5 milliónir | Nýggj útseting 18 milliónir | Hugsað dømi |
|---|---|---|---|
| 1 veðrættur | 204.750 | 491.400 | 65% |
| Fóðurfígging | 47.250 | 113.400 | 15% |
| Eginpeningur | 63.000 | 151.200 | 20% |
| Total | 315.000 | 756.000 | 100% |

Kelda: Føroya Banki og Føroya Sparikassi. Gjaldføristørvurin fyri nýggja útseting verður mettur sum tal av smolti faldað við 42.

Um tildømis 7,5 milliónir smolt verða sett á sjógv í ár, skal alivinnan bert til hendan árgangin fáa til vega 110 milliónir krónur um so verður at 1. veðrættur fíggjar 65%. Um sama nøgd verður sett útaftur árið eftir, veksur fíggjartørvurin til umleið 170 milliónir krónur. Um 18 milliónir smolt verða sett á sjógv, skal alivinnan útvega 265 milliónir krónur, um so verður at 1. veðrættur fíggjar 65%.

Eingin vissa er fyri, at hendan fígging fast, og tí vil bert framtíðin og fíggingarmynstrið koma at avgera, hvussu nógv av tí, sum er sett út, verður framleitt fram til tøku.

### *5.1.3 Trupulleikin at fáa nýggjan eginpening í alivinnuna*

Fíggingarmøguleikar til vanligan rakstur hava ikki víst seg at trotið í Føroyum. Men við verandi lóggávu kunnu útlendingar bert eiga upp til 33% av einum sjógvalara, og hevur alivinnan sera avmarkaða atgongd til nýggjan kapital til eginpening. Samstundis er hetta ein vinnugrein, ið krevur sera stóra eginogn, tí vinnan skal klára stór sveiggj í rakstrarúrsliti orsakað av óstøðugum marknaðarprísum.

Verjugarðarnir gera, at stór ábyrgdarfull alifeløg, sum tildømis Nutreco, Cermaq og Stolt Seafarm eru til staðar í øllum alitjóðum í heiminum uttan í Føroyum.

Møguleikarnir fyri at fáa eginpening í alivinnuna kunnu býtast í fýra:

1. Verandi eigarar av alibrúkum seta meira pening í
2. Lokala intiativið tekur eitt tak fyri at seta pening í
3. Onnur stór privat feløg og almennir grunnar seta pening í
4. Útlendskir íleggjarar við tilknýti til alivinnuna seta pening í

ad1.

Við verandi marknaðarprísum hevur alivinnan lítlan og ongan eginpening eftir, tá árið er runnið. Verandi eigarar kunnu tí ikki koma við stórvegis nýggjum eginpeningi.

ad2.

Siðvenja hevur verið, at ein bygd ella býur ella oyggj hevur savnað pening saman til dømis til at keypa skip ella opna fiskavirki. Tað lokala intiativið er ikki loysnin í alivinnuni. Eitt tílíkt øki kann savna ein lítlan part saman, men kann ikki eiga meirilutan, tí alivinnan krevur stóra eginfígging. Endurreising av einum alibrúki á einum fjørði við tí støðd sum í dag er galdandi krevur vanliga eitt innskot á minst 20 milliónir krónur, um eginpeningurin er burtur. Fyri eitt lokalt øki er hetta sera nógvur peningur. Um samanborið verður við eitt traditionelt flakavirki, hevur tað ein eginfíggingartørv á bert ein fimting av hesum. Hartil er vágin hjá íleggjarum í einum alibrúki rættiliga nógv størri samanborið við eitt fiskavirki grundað á tey stóru sveiggini í marknaðarprísum.

ad3.

Hugsast kann, at stórar føroyskar fyritøkur ella almennir grunnar kunnu skjóta eginpening í alivinnuna. Tøkur peningur er bæði í øðrum fyritøkum og almennum grunnum. Staðfestast kann, at føroyskar fyritøkur ella almennir grunnar higartil í lítlan mun hava sett eginpening í alivinnuna. Tað verður ikki mett, at hesar fyritøkur og grunnar verða aktørar í alivinnuni, millum annað grundað á, at eingin siðvenja er fyri at seta pening í eina vinnugrein, sum alivinnuna, har rættiliga fá hava innlit.

ad4.

Ein altjóða alari hevur siðvenju at seta pening í alibrúk um allan heim. Tey stóru alarafeløgini hava innskotið eginpening í alibrúk í Kili, Norra, Skotlandi, Írlandi og Kanada. Tí er ikki óhugsandi, at hesar stóru alifyritøkurnar eisini høvdu havt áhuga í at sett eginpening í føroyska alivinnu, um so var, at teir fingu ávirkan samsvarandi innskotinum. Hesi feløg hava eisini tað fíggjarligu styrkina at koma við eginpeninginum.

Samanumtikið verður mett, at um alivinnan skal fáa til vega nøktandi eginpening við nýteknan er neyðugt at eisini útlendskir íleggjarar fáa møguleikan at skjóta pening í vinnuna. Hetta tí at tørvurin á nýggjum eginpeningi er stórur, sum greitt er frá frammanundan. Mett verður, at føroyskir íleggjarar neyvan kunnu nøkta hendan tørvin, tí er tað absolut neyðugt, at útlendskir íleggjarar fáa fría atgongd sum íleggjari til føroyska alivinnu uttan lógarsettar forðingar[2].

### *5.1.4 Roknskapartøl fyri føroyskar alarar og altjóða alarar*

Fyri at lýsa hvørja støðu føroysku alararnir eru í, er neyðugt at samanbera teir við eitt nú tey stóru altjóða alifeløgini, sum í dag mynda heimin.

Framleiðslutíðin fyri alifisk er 2 til 3 ár, og tí verður hugt eftir í minsta lagi 3 árum

[2] Havsbrún p/f mælir til, at markið fyri útlendskum íleggjarum verður hækkað, men at útlendskir íleggjarar ikki kunnu eiga meirilutan

fyri at fáa eina mynd av gongdini.

Soliditeturin hjá einari fyritøku vísir, hvussu sterk hon er, og fyri føroysku alivinnuna er soliditeturin null, tá ið árið er runnið. Tey stóru alifeløgini í heiminum stýra framleiðsluni í grannalondunum, og tí er neyðugt at hyggja eftir, hvønn soliditet tey hava og hvørja styrki tey hava til at føra alivinnuna í grannalondunum víðari.

Talva 7. Soliditetur fyri fimm aljóða alarar og miðal fyri føroyskar alarar

| Feløg | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|
| Føroyskir alarar | 21 | 31 | 26 | 14 |
| Nutreco | 35 | 33 | 33 | 37 |
| Pan Fish | 15 | 14 | 14 | -14 |
| Fjord Seafood | 33 | 29 | 32 | 40 |
| Stolt Seafarm | 37 | 29 | 28 | 26 |
| Cermaq | 62 | 44 | 36 | 40 |

Kelda: Roknskapir hjá feløgunum. Ikki er tikið hædd fyri muni í virðisásetingum frá einum landi til annað.

Talva 7 vísir, at soliditeturin hjá tí føroysku alivinnuni lækkar. Mett verður, at soliditeturin verður null, tá ið árið er runnið. Burtursæð frá Pan Fish eru altjóða alifeløgini væl fyri fíggjarliga. Cermaq hevur tí bestu fíggjarligu styrkina, Nutreco og Fjord Seafood eru væl fyri. Styrkin hjá Stolt Sea Farm er minkandi, og styrkin hjá Pan Fish er vekk. Tað kann vera munur á roknskaparreglum frá einum landi til annað, sum ikki er tikið hædd fyri í talvu 7.

Um so var, at Cermaq, Nutreco og Fjord Seafood framleiddu alifisk í Føroyum, høvdu hesi feløg orkað at ført alivinnuna víðari. Tey høvdu ikki vaksið um framleiðsluna í løtuni, men tey høvdu kunnað havt hana á einari tryggari legu. Hetta er tað mynstrið sum sæst í Norra og Skotlandi. Framleiðslan veksur ikki, men hon minkar heldur ikki nevnivert, og tí er alivinnan í grannalondunum ikki í somu kreppu sum í Føroyum.

Pan Fish hevur havt eina aðra lagnu, og størsta orsøkin er hon, at Pan Fish hevur havt eina annan málsetning enn hini feløgini. Pan Fish hevur havt sum málsetning at vaksa heldur enn at fáa sum mest burturúr til sínar íleggjarar.

### *5.1.5 Norskar, skotskar og írskar roymdir við útlendskum kapitali*

Alitjóðirnar, sum Føroyar kappast við, hava ikki sett forðingar fyri útlendskum kapitali. Í Kili, Íslandi, Norra, Skotlandi og Írlandi kunnu útlendingar eiga alibrúk og reka alibrúk.

Í Skotlandi eiga útlendingar 85% av alivinnuni. Í fyrstuni var ein illvilji í Skotlandi ímóti útlendskum íleggjarum, tí mett var, at alivinnan var serskotsk, og at vinnan skuldi vera ein húsmansvinna. Men skotar sóðu skjótt, at Skotland mátti vera við í altjóðagerðini av vinnuni. William Crowe, sum er stjóri í Scottish Salmon Producer´s Organisation, sigur, at ”*jobs are more important than ownership*”. Skotar hava ásannað, at arbeiðspláss eru meira týdningarmikil enn eigaraviðurskifti. Alivinnan í Skotlandi hevur 6.500 arbeiðispláss og framleiðir í dag 145.000 tons av laksi. Um eingin útlendskur kapitalur var í Skotlandi, hevði framleiðslan verið rættiliga nógv minni, og færri arbeiðispláss høvdu verið í vinnuni. Skotska alivinnan hevði eisini verið í kreppu í dag, og framleiðslan hevði lækkað nógv vegna manglandi kapital. Men av tí at feløgini eru stór og sterk, lækkar framleiðslan ikki, men stendur í stað. William Crowe skjýtur upp, at ístaðin fyri at seta forðingar fyri, at útlendingar kunnu keypa alibrúk í Føroyum, skuldi heldur verið settar treytir í aliloyvið, sum ger, at ein útlendskur alari er ein ábyrgdarfullur eigari, sum skal halda seg innanfyri nakrar umhvørvisligar karmar. Hann skal somuleiðis hava eitt burðardygt alibrúk, soleiðis at alifelagið er ein trygd fyri arbeiðispláss í Føroyum og ein partur av menningini í tí føroyska samfelagnum.

Í Norra var politiski myndugleikin ímóti, at útlendskur kapitalur kom inn í alivinnuna, tá tað niðurlendska felagið Nutreco keypti Hydro. Í dag hevur hetta stríðið lagt seg, og sum heild er Norra ikki ímóti, at útlendingar eiga alibrúk. Tað skal tó nevnast, at einasta stóra sølan av alibrúkum til útlandið er omanfyrinevndað Hydro, og bert 11% av tí norsku alivinnuni er útlendsk. Trond Davidsen, stjóri í FHL Havbrug, sigur, at Norra er ikki ímóti útlendskum kapitali, tó tað hevur ongantíð verið ein stórur trupulleiki í Norra, tí tað eru tey norsku feløgini, sum eru farin inn í onnur lond.

Knut A. Hjelt frá FHL Havbrug sigur, at trupulleikin av stórum feløgum í Norra, er, at tey hugsa í hópframleiðslu. Tí vera kryvjivirkir og liðugtvøruvirkir stongd og flutt til størri eindir aðrastaðni í landinum. Men hetta er ein gongd, sum ikki ber til at steðga, og hetta hendir óansæð, um útlendskur kapitalur er inni.

Ingvald Løyning, fyrrverandi stjóri í bæði Marine Harvest og Skretting og núverandi stjóri í Nutreco Aquaculture, sigur, at Marine Harvest hevði áhuga at koma til Føroya í 2000, men 33% forðingin gjørdi, at onnur lond vóru meira áhugaverd. Tað, sum er avgerðandi fyri, at Marine Harvest investerar í einum landi er, at framleiðslan er marknaðarstýrd. Marine Harvest marknaðarførir og selir vøruna undir egnum navni á marknaðinum. Marine Harvest metir tí, hvat er mest áhugavert at selja alt eftir, hvør tørvurin er, og tí er neyðugt, at Marine Harvest avger, hvat skal framleiðast, og hvussu vøran verður framleidd. Fyri at náa hesum málið er tað ein treyt, at Marine Harvest hevur avgerðarrættin og harvið meirilutan í einum alibrúki.
Støðan í dag er hon, at alivinnan í Evropa er í kreppu, og tí keypir Marine Harvest ikki fleiri alibrúk í Evropa. Tað einasta landið í løtuni at gera eina skilagóða íløgu í er Kili, sum hevur góðan vøkstur og góðan vinning. Marine Harvest veksur tí um virksemið sítt í Kili. Í verandi løtu hevði Marine Harvest ikki komið til Føroya at ala, tó tá ið marknaðarprísurin hækkar aftur verður hendan støðan broytt.
Tað sum er avgerandi fyri at ein altjóða alari, sum Marine Harvest, ger íløgir í alivinnuna í einum landi er:

1. at framleiðslukarmarnir eru teir bestu,
2. at marknaðaratgongdin er tann besta,
3. at framleiðslan er kappingarfør.

Fyri at tekkjast einum tílíkum altjóða alara er neyðugt, at føroyska alvinnan er kappingarfør. Hendan ábyrgdin liggur hjá vinnuni sjálvari, men marknaðaratgongd og framleiðslukarmar liggja hjá tí politiska myndugleikanum at loysa. Um hesi viðurskiftini eru ílagi vil ein altjóða alari altíð menna alivinnuna og samfelagið sum heild í Føroyum.

Í Írlandi er 40% av alivinnuni á útlendskum hondum. Feløgini eru úr Niðurlondum,

Norra, Týsklandi og Onglandi. Ongantíð hevur nøkur forðing verið fyri útlendskum kapitali. Richard Flynn, stjórin í The Irish Salmon Growers Association, sigur at *"having foreign capital come into the country does not mean that the natural resources are being lost forever. The plain fact is that it is still the same irish people working on the farms, no matter who owns the shares."*

Richard Flynn sigur víðari, at *"the salmon industry in fact always welcomes some foreign investment, because as well as bringing capital into an industry which needs it, there are spin-off effects in terms of realising our production potential and growing the services which benefit all farmers."*

Richard Flynn sigur eisini, at *"sometimes foreign investment has also encouraged the industry to use different techniques or technology from the investor's home country which is useful generally."*

## 5.2 Veðseting

Føroya Havbúnaðarfelag hevur samanvið peningastovnunum víst á, at neyðugt er, at lánveitarin fær veð í aliloyvinum.

Støðan í dag er hon, at um ein alari ikki heldur sínar skyldur, og alarin fer á húsagang, fellur aliloyvið aftur til landið.

Tá alarin ikki heldur sínar skyldur, hendir vanliga, at bústjórin ella lániveitarin framleiðir fiskin, sum er í alibrúkinum, fram til tøku, og síðani verður fiskurin seldur og alibrúkið niðurlagt. Ognirnar, t.v.s. útgerð, ringar o.a. verða seldar á tvingsilsølu. Vinnumálaráðið kann so geva aliloyvið til triðja mann, sum so byrjar av nýggjum. Hetta vil við øðrum orðum siga, at tann parturin av alivinnuni, sum ikki heldur sínar skyldur, verður niðurlagdur. Í løtuni kann hesin partur lætt gerast ein týðandi partur av alivinnuni, tí flest allir alarar fara við verandi gongd ikki at kunna halda sínar skyldur, tá árið er runnið.

Ein veðseting vildi givið lániveitarunum møguleikan at selt verandi alibrúk við loyvum til aðrar, sum síðani høvdu hildið fram við framleiðsluni, t.v.s. at samfelagið sleppur undan dýru mannagongdini at niðurleggja alibrúk fyri síðani at byrja av

nýggjum aftur. Hendan loysnin hevði gjørt, at hóttafallið, sum er við at koma á alivinnuna, hevði verið minni.

Hendan loysnin sær ikki út til at vinna frama hjá politiska myndugleikanum. Grundgevingin er, at ein lániveitari ikki skal umsita landsins ognir, og at aliloyvi er ein brúksrættur, sum alarin hevur fingið frá Føroya fólki. Men lániveitarar koma ongantíð at reka alivinnuna, teir hava ikki loyvið til tess. Vinnumálaráðið skal eisini til eina og hvørja tíð góðtaka tann persón ella felag, sum umsitur eitt aliloyvi. Aliloyvið eigur at fara til tann persón ella felag, sum setir seg føran fyri at reka alibrúkið víðari og sum hevur førleika á økinum. Um aliloyvir vera tikin inn og givin út aftur til triðja persón av tí politisku skipanini, er vandi fyri, at tað ikki verður tikið hædd fyri førleika og fíggjarligari styrki, men at politiskar orsøkir liggja sum grund undir avgerðini.

Ein veðseting vil hjálpa alivinnuni til framhaldandi at fáa fígging og samstundis vera við at tryggja, at framleiðslan av alifiski í Føroyum heldur fram.

Veðsetingin vil eisini gera trygdina hjá lániveitarunum betri og kann tí eisini lokka útlendska fígging til Føroya.

### 5.3 Skattaviðurskiftini

Skattareglurnar fyri alivinnuna eru lagaligari hjá kappingarneytunum í Norra og Skotlandi enn tær eru í Føroyum. Tó skal nevnast, at skattaprosentið í Føroyum er lægri enn eitt nú í Norra. Føroyski partafelagsskatturin er 20% ímun til 28% í Norra. Føroya Havbúnaðarfelag hevur síðani 1998 víst á tær lagaligu skattareglurnar í Norra og setti ein skattabólk í 1999, sum út frá kanningum vísti á, at bæði reglurnar fyri ”carry back” og reglurnar fyri áseting av virðinum av fiski í sjónum eru lagaligari hjá kappingarneytunum.

### *5.3.1 Goymsluáseting*

Í Norra er skipanin soleiðis í skattaroknskapinum, at allur kostnaður til fisk í sjónum verður útreiðsluførdur men ikki inntøkuførdur. Hetta merkir, at skattur verður ikki goldin fyrr enn tað akkumuleraða yvirskotið er størri enn virðið av fiskinum sum svimur í ringunum. Í Føroyum er støðan hon, at tilgongd til smolt, fóður og lønir verður inntøkuførd. Goymslan kann tó niðurskrivast 15%.

### *5.3.2 Skattaafturbering*

Í Norra kann skattur goldin eitt ár verða endurgoldin felagnum innan tvey ár, um tað vísir seg, at felagið fær undirskot innanfyri hetta tíðarbilið. Í Írlandi og Hetlandi er hetta tó bert 1 ár. Í Føroyum er ikki møguligt at fáa goldnan skatt aftur.

### *5.3.3 Framflyting av skattligum halli*

Í Norra kann hall førast fram í 10 ár og trekkjast av skattliga úrslitinum. Í Írlandi og Hetlandi er einki mark fyri møguleikanum at framføra hall. Í Føroyum kann hall flytast fram í 5 ár og trekkjast av skattliga úrslitinum.

Sum omanfyri nevnt eru skattareglurnar fyri alibrúk í Norra munandi lagaligari enn tær føroysku. Úrslitið vísir seg at vera sera kappingaravlagandi. Umframt at gjalda minni skatt og harvið fáa eitt munandi betri gjaldføri, gevur hetta eisini eina stóra rentusparing hjá norskum feløgum, sum gevur ein hægri eginpening.

Her er vert at viðmerkja, at Endurreisingarnevnd landsstýrisins í áliti sínum í 1994 vísti á hesi viðurskifti. Føroyska skattalógin tekur í hesum viðurskiftum støði í tí donsku, ið er tillagað donskum samfelagsviðurskiftum og ikki einum samfelag, sum tað føroyska. Alivinnan má liva við stórum sveiggjum í marknaðarprísum, sum kunnu hava stórar og óvæntaðar broytingar frá ári til árs. Og hetta eigur skattalógin at leggja upp fyri.

Ein skjót gjøgnumgongd av almennu ársroknskapunum í føroysku alivinnuni vísir, at føroyska alivinnan síðani 1993 hevur goldið umleið 100 milliónir krónur í skatti. Um norsk skattaviðurskiftir vóru galdandi í Føroyum hevði stórur partur av hesum skatti

ikki verið goldin. Hesin skattur hevði komið alivinnuni væl við í dag, og kreppan hevði ikki verið so álvarsom.

### 5.4 Marknaðarforðingar

Forðingar úr ES er ein hóttan móti tí føroysku alivinnuni. Tvey dumpingmál hava verið, sum føroyingar tó komu væl frá. Laksamálið var slept, tí eingin dumping varð funnin. Í sílamálinum er tollur ásettur, men tað hevur onga fíggjarliga ávirkan, tí so lítið av sílum verða seld á ES marknaðinum. Um so var, at tollur var lagdur á laksin, hevði hetta havt stóra ávirkan, tí 80% av laksinum verður seldur til ES. Møguleiki er fyri, at skotar aftur fara at klaga føroysku alivinnuna.

Skotar og írar hava fríða atgongd. Norra hevur goldið 5%, men tollurin er 2% í dag. Kilenar hava fríða atgongd. Føroyar hava eisini fríða atgongd. Men kreftir í Skotlandi og Írlandi royna allatíðina at seta forðingar í vegin. Endamálið hjá teimum er sjálvsagt, at geva sær sjálvum ein kappingarfyrimun.

Føroyska alivinnan vann dumpingmálið fyri laks fyrr í ár. Men um Føroyar fingu toll, so hevði tað verið eitt sera stórt fíggjarligt bakkast fyri føroyska alivinnu. Eitt dømi kann lýsast soleiðis. Um føroyskir alarar vóru sekir í at hava dumpað við til dømis 5%, hevði tað merkt, at føroyskir alarar skuldu rinda 5% í tolli av øllum laksi, sum verður seldur til ES í 5 ár. Útflutningurin til ES er umleið 700 milliónir krónur árliga. Hetta hevði givið ein toll á 35 milliónir krónur um ári í 5 ár. Hendan kostnað hevði alivinnan ikki klárað at borið í dag.

Hóttanin er altíð tilstaðar so leingi eingin greið avtalað er við ES um hesi viðurskiftini.

----------------------------------------------